## Stjórnin hevði fallið

Hevði altingsval verið í Íslandi nú, hevði Sjálfstæðisflokkurin verið tann stóri vinnarin og Samfylkingin hjá Jóhonnu Sigurðardóttir, forsætisráðharra tann stóri taparin. Ein nýggj meiningakanning gevur Sjálfstæðisflokkinum 40,4 prosent av atkvøðunum og 27 tingmenn ímóti teimum 15, sum flokkurin nú hevur. Harafturímóti hevði Samfylkingin mist fimm av sínum 20 tinglimum. Hin stjórnarflokkurin, VG, hevði mist ein av sínum 14 tinglimum. Samanlagt hevði stjórnarsamgongan mist meirilutan. Hon hevði fingið 28 av teimum 63 altingslimunum.



## Fer ikki til Asia

Amerikanski forsetin, Barack Obama, hevur avlýst eina ætlaða ferð til Asia. Ístaðin fyri ætlar forsetin at brúka alla sína tíð og alla sína orku til at fáa meiriluta fyri sínum uppskoti um eina heilsunýskipan. Umboðsmannatingið skal ætlandi atkvøða um uppskotið í morgin ella sunnudagin, og tær seinastu metingarnar siga, at uppskotið fær í hvussu er tær neyðugu 216 atkvøðurnar. Verður uppskotið samtykt, er talan um ta størstu nýskipanina innan amerikanska heilsutænastu í 50 ár, skrivar AP.

# Nýggjur trolposi ólógligur




*Tá trolbáturin Skálafossur kom til lands, og løgreglan stóð fyri skiparanum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**- Eg havi onga orsøk at halda, at posin ikki var í lagi, tá hann kom frá Vónini. Men tað er nú soleiðis, at meskarnir í posanum hjá teimum smáu trolbátunum minka eitt lítið sindur, tá trolið er í sjónum, sigur Dánjal Jacobsen, reiðari á trolbátinum Skálafossi**

BROT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Miðskeiðis í hesi vikuni tók vaktar-og hjálparskipið Tjaldrið trolbátin Skálafoss, sum Dánjal Jacobsen í Vestmanna eigur. Hetta hendi, meðan trolbáturin var til fiskiskap á Skeivabanka, har teir royndu eftir havtasku.

Fólk av Tjaldrinum vóru umborð á trolbátinum og staðfestu, at meskarnir í trolposanum vóru ov smáir. Markið er 145 mm., men nakrir meskar vórðu sum skilst máldir til at vera 141 og 142 mm.

### Nýggjur posi

Reiðarin á Skálafossi, Dánjal Jacobsen, sigur, at trolposin var rættiliga nýggjur, bert nakrar fáar vikur gamal, tá eftirlitsfólk komu umborð at máta meskar.

- Eg havi onga orsøk at halda, at posin ikki var í lagi, tá hann kom frá Vónini. Men tað er nú soleiðis, at meskarnir í posanum hjá teimum smáu trolbátunum minka eitt lítið sindur, tá trolið er í sjónum. Hinvegin plaga vit at siga, at meskarnir í trolposanum hjá eitt nú partrolarunum veksa. Hetta hevur nakað við vektina at gera, sigur hann.

Tá vit hittu Dánjal Jacobsen í telefonini í morgun, var hann júst afturkomin av ísfiskatúri við Vesturbúgvanum.

- Eg havi ikki fingið fylgt málinum so væl, nú eg havi verið burtur, men eg havi skilt, at tað restaði ógvuliga lítið í, at meskarnir vóru í lagi.

Reiðarin sigur seg hava skilt, at ein ávísur háttur verður brúktur til at máta meskarnar í trolposa.

- Eg havi skilt, at mátaðir vera tríggjar ferðir 20 meskar, og síðan verður miðalmátið roknað. Júst, hvussu úrslitið var við meskunum í trolposanum hjá Skálafossi, eri eg ikki heilt greiður yvir, men eg havi skilt, at tað lá beint niðanfyri 145 mm.

### Ikki tilætlað

Reiðarin leggur dent á, at brotið, sum skiparin á Skálafossi framdi, á ongan hátt var tilætlað.

- Trolbáturin fiskar havtasku, og tá kann tað vera líka mikið, um meskarnir eru 145 mm. ella meiri, sigur hann.

Dánjal Jacobsen heldur, at tað sjálvandi er torført hjá eftirlitinum og ákæruvaldinum at seta eitt mark fyri, hvussu stór toleransan kann vera, men hann ásannar, at tað er súrt at fáa eina bót uppá 40.000 krónur fyri meskar í einum nýggjum trolposa.

- Tað greiðasta er kanska, at er miðalmátið fyri meskarnar niðanfyri 145 mm., er trolposin ikki lógligur. So, hetta mugu vit ivaleyst bara taka á okkum og hava soleiðis góðtikið bótina, vit hava fingið, sigur reiðarin, Dánjal Jacobsen.

Túrurin hjá Skálafossi var um at vera liðugur, tá trolbáturin varð tikin á Skeivabanka.

## Meiri makrelur

Ætlanin var at hava meiri um dyrging eftir makreli í Sosialinum í dag, men hetta tilfar kemur ikki fyrr enn mánadagin. Blaðið í dag er trongt, og tí fara vit ikki at kroysta hetta tilfar burtur í dagsins blaði.

Sosialurin hevur fingið stuttu frágreiðingina, sum Kristian Zachariassen á Havstovuni hevur skrivað um royndir eftir makreli við dorg í fjør og fyrraári.

Seinnu árini hevur tað nevniliga víst seg, at meiri makrelur hevur verið inni á landgrunninum enn annars.

Bæði fiskimenn og Havstova hava verið varug við hetta, og í blaðnum mánadagin fara vit at venda aftur til málið um makrelin.

**-vilmund**



*Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum*

# Eingin toleransa

**Leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, sigur, at tað finst eingin toleransa, um meskar í trolposa eru ov smáar. – Vit hava eina kunngerð at ganga eftir, og tá hon verður brotin, er reiðskapurin ólógligur, sigur hann**

BROT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at sambært kunngerðini um meskastøddir, er eingin toleransa sum loyvir, at meskarnir kunnu vera undir ásettu mátini.

- Vit hava soleiðis ikki heimild til at gera undantøk frá ásetingunum. Gera vit tað kortini, bróta vit kunngerðina, og tað kunnu vit sjálvandi ikki.

So avgjørdur er leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum.

Tað er soleiðis heldur ikki uppgávan hjá eftirlitinum at gera av, hvør hevur ábyrgdina av, at meskar í lutfalsliga nýggjum trolposa eru ov smáir.

- Tað er lóggávuvaldið sum ásetir, hvørjar reglurnar eru, og okkara uppgáva er at syrgja fyri, at reglurnar verða fylgdar, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum.